# Heldur lakari hjá Havila

Árið í fjør royndist ikki so væl hjá norska frálandsfelagnum Havila. Roknskapurin, sum júst er kunngjørdur, vísti 250 milliónir norskar krónur í avlopi fyri skatt, og tað var 90 milliónir minni enn í 2007. Eins og hjá so mongum øðrum var rað serliga tann seinasti ársfjórðingurin í fjør, sum ávirkaði úrslitið tann skeiva vegin. Havila sigur, at teir tríggir mánaðirnir góvu 86 milliónir norskar krónur í halli. Á inntøkusíðuni var 2008 eitt gott ár, tí rakstrarinntøkurnar vóru 1,1 mia. norskar krónur ella næstan tvær ferðir so nógv sum árið fyri.



# Umhugsa at binda

Í fiskamarknaðunum í Íslandi er prísurin á toski og hýsu fallin so nógv í seinastuni, at fleiri reiðarí umhugsa at gevast við fiskiskapinum. Morgunblaðið skrivar, at meðalprísurin á kruvdum toski hevur ligið um 10 krónur fyri kilo, og at prísurin á hýsu hevur ligið millum seks og níggju krónur. Orsøkin er, at tað er óvanliga trupult at sleppa av við fiskin á marknaðunum uttanlands, og tað hevur fingið fleiri av teimum stóru reiðaríunum at umhugsa at gevast við fiskiskapinum, skrivar Morgunblaðið.

# Makt skal takast

**– Tá tað snýr seg um makt, mugu eisini kvinnurnar vita, at maktina fær mann ikki – hana tekur mann. Tað sigur annar av høvuðsrøðarunum á "Kvinnuvikuskiftinum", sum verður í Norðurlandahúsinum 7. og 8. mars. Benja Stig Fagerland, leiðari, íverksetari, stjóri, ráðgevi o.m.a vitjar aftur í Føroyum, og hesaferð er tað sum "hálvur føroyingur". Boðskapurin hjá henni til føroyskar kvinnur er tann sami: - Viljin til at vilja, skapar evnini til at kunna!**



*– Tá tað snýr seg um makt, mugu eisini kvinnurnar vita, at maktina fær mann ikki – hana tekur mann, sigur Benja Stig Fagerdal, sum er annar av høvuðsrøðarunum á Kvinnuvikuskiftinum, sum verður í Norðurlandahúsinum 7. og 8. mars.*

*Mynd: Leif Láadal*

VINNUKVINNUR
*Leif Láadal*

Tað mundi vera nógv sum fóru heim við høvdinum fullum av nýggjum ella endurnýggjaðum tonkum, eftir at hava hoyrt Benju Stig Fagerland á Hotel Føroyum 8.mars í fjør. Hesi og onnur fáa nú aftur møguleikan, tí um ein lítlan mánað, vitjar norska "orkuverkið" aftur oyggjar okkara. Tað kann kanska tykjast eitt sindur løgið, at tiltakið hjá blaðnum "Kvinna" ár um ár hevur sama høvuðsrøðara, men tað hevur fleiri frágreiðingar. Fyri tað fyrsta, so inniheldur Benja Stig Fagerland so nógva vitan og royndir, at har er nóg mikið til átjan Føroyaferðir. Harafturat hendi nakað í Føroyum í fjør, sum ger at norski íverksetarin er noydd at koma aftur hendaveg. Og so er hon heldur ikki einsamøll á høvuðspallinum: Penille Aalund vitjar eisini!

### Heimskenda Benja

Benja Stig Fagerland bleiv kend alment í stórum pørtum av heiminum við verkætlanini "Female Future". Fyri at sleppa undan einum politiskum kravi um, at so og nógvar kvinnur skuldu sita í partafelagsnevndum og leiðslum í Norra, valdi felagið hjá arbeiðsgevarunum í matvøruídnaðinum í Norra at heita á Benju Stig Fagerland um royna at skipa soleiðis fyri, at tær fingu tað, uttan politiska uppíblanding.

Og tað eydnaðist. Upp á trý ár øktist talið á kvinnum í nevndum og leiðslum í Norra frá 6,3 prosent upp í 21,3. Uppskriftin var fyri so vítt líkatil, sigur Benja:

- Viljin til at vilja, skapar evnini til at kunna, og síðani leggur hon afturat:

- Tá tað snýr seg um makt, mugu eisini kvinnurnar vita, at maktina fær mann ikki – hana tekur mann.

Í dag er Benja stjóri í fyritøkuni Talent Tuning, sum m.a. ráðgevur leiðarum í vinnulívi og innan tað almenna um kvinnuligar leiklutir í lokala-, lands- og heimssamfelagnum. Harafturat skrivar hon bøkur – tann nýggjasta, sum verður grundarlag fyri fyrilestrinum í Føroyum, eitur "Succespunktet", ið hon hevur skrivað saman við Peter Horn.

### Kynsspurningurin darvar

- Stríðið fyri javnrættindum er ikki ein bardagi, men

## Fakta

Kvinnudagurin 8.mars í ár verður m.a. hildin sum ein stórt Kvinnuvikuskifti í Norðurlandahúsinum. Tann 7.mars skipar blaðið Kvinna fyri fyrilestrum við Pernile Aalund og Benju Stig Fagerdal og kjósan av ársins "8.mars kvinnu". Eisini er tónleikur við Jensinu og Eivør á skránni. Dagin eftir skipar Kvinnufelagið fyri, og er høvuðsevnið "Kvinnur í fíggjarkreppuni". Eisini er sjónleikurin "Eitt Dukkuheim" á skránni.